**Spurningur**
Kunnu tit útgreina nærri, hvørjar licensir talan kann verða um í 5.2.1 , 5.2.2. , 5.2.3?

**Svar**
Ynskt verður at ráðgevin hevur við sær egna teldu, og tey kt-amboð, sum hann hevur brúk fyri, fyri at loysa uppgávurnar. Dømi um hetta kann verða Visual Studio, men eisini vanlig standardtøkni sum Windows, MS Office og antivirus-forrit. Amboð, sum verða roknað sum felagsamboð, har Undirvísingarstýrið umsitur lincensir og tillutar brúkaraloyvir, t.d. Jira, GitHub, Figma og Telerik, rindar Undivísingarstýrið fyri.

**Spurningur**
Í 6.1 stendur: "IT-konsulenternes hjemorganisation må ikke under nogen form - hverken direkte eller indirekte - kræve betaling for arbejde, som ikke fuldt ud kommer LFS-projektet til gode."
Hvussu skal hetta skiljast, tá arbeitt verður eftir fyriskipan hjá UVS?

**Svar**
Her verður víst til arbeiðið, sum ikki er beinleiðis tillutað kt-ráðgevum av UVS (t.d. í einum back-loggi) og ikki frammanundan eru avtalað millum kt-veitara og UVS. Talan kann t.d. verða um ferðaútreiðslur, fundarvirksemi, umsitingarligt arbeiðið o.a.t.

**Spurningur**
Í 6.2. stendur: "IT-konsulenten og dennes hjemorganisation har i den forbindelse et medansvar for den tekniske drift i kontraktperioden iht. samarbejdskontrakten."
Vit skilja ikki heilt, hvussu hetta skal tulkast. Ber til at útgreina hetta nærri?

**Svar**
Eftir nærri avtalu millum partarnar, vil Undivísingarstýrið tryggja sær, at skikkaðir kt-ráðgevar eru tøkir at finna og rætta feilir í rakstrarumhvørvinum.

**Spurningur**
Tá ið vinnarar av tilboðunum eru funnir, verður prísurin javnaður, soleiðis at t.d. allir veitarar fáa lægsta prís?

**Svar**
Nei, vinnarar av tilboðunum koma inn við tí prísi, sum teir hava bjóðað í tilboðnum.

**Spurningur**
Í DevOps kompetenceskema, standa tøknir fyrst og síðani Azure varianturin, í parantes. Eitt dømi er "Database (Azure SQL)" ella "Monitoring (Azure Insight)". Ein ráðgevi kann hava nógvar royndir í databasu ella monitoring, uttan at nakrantíð hava rørt við Azure Insight, t.d.

Skal tað tulkast generelt (ikki Azure) ella er parantesin spesifik (bara Azure), ella skal man skriva " 2 (0) " og harvið svara báðum?

**Svar**
Ein kann svara fyri generellar royndir og so fyri Azure, t.v.s. ein, sum hevur nógvar dátugrunnroyndir, men færri royndir í Azure dátugrunnum, kann svara: 2(1) - t.v.s Azure royndir í klombrum.

**Spurningur**
Kann tað koma uppá tal, at Undirvísingarstýrið broytir leistin í útboðnum soleiðis, at útboðið í staðin fevnir um, at menningareindir verða bodnar út til veitarar?

**Svar**
Útgangstøðið er, at leisturin, sum er lýstur í útboðnum, verður framdur.

**Spurningur**
Kunnu tit greiða frá, hvussu tit ætla at skipa raksturin av skipanini?

**Svar**
Eins og lýst í útboðnum undir punkt 1.4 verður væntað, at Undirvísingarstýrið lýsir eftir tilboðum frá veitarum uppá rakstur, viðlíkahald og tænastur.